# menningina



# Leirvíkar bygd als ikki til reiðar til upplatingina

**– Verður málið um vegaføringina í Leirvík útsett, heita vit á avvarðandi myndugleikar um, at dagurin, tá ið Norðoyatunnilin letur upp fyri almennari ferðslu, verður útsettur í minsta lagi í samsvar við útsetingina av tíðarfreistini í lógini, sigur Leirvíkar bygdarráð í einmæltum skrivi til løgting og landsstýri**



*Landsverk mælir til vegaloysn omanfyri bygdina og niðanfyri bygdarhúsið*

Mynd: Vilmund Jacobsen

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár, 15. februar, samtykti Leirvíkar bygdarráð einmælt eina áheitan á løgting og landsstýri um at avgreiða málið um vegaføringina í Leirvík, nú tíðin, til Norðoyatunnilin letur upp, nærkast í stórum.

## Ikki útseting

Í fyrsta lagi heitir bygdarráðið á landsins myndugleikar um ikki at útseta avgerðina viðvíkjandi farleiðini um Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin.

Í skrivinum endurtekur bygdarráðið einmæltu samtyktina, sum bygdarráðið gjørdi á fundi, 6. januar 2006. Her tilmælir bygdarráðið sum kunnugt, at ein tunnil – ella lokrenna, sum tunnilin eisini verður róptur – verður bygd niðri í bygdini í Leirvík.

– Lógin um fast samband um Leirvíksfjørð leggur upp til, at myndugleikin á staðnum verður hoyrdur, og vit vænta, at myndugleikarnir taka atlit til avgerðina hjá bygdarráðnum.

## Avgerðin umráðandi

Í skrivinum verður stórur dentur lagdur á, hvussu umráðandi tað er fyri leirvíkingar, at løgtingið hevur tikið endaliga avgerð um farleiðina um Leirvík, áðrenn Norðoyatunnilin letur upp – og ferðslan kann koyra gjøgnum Leirvíkar bygd.

– Sum støðan er nú, er Leirvíkar bygd als ikki til reiðar at taka ímóti ferðsluni til og úr Norðoyatunlinum, verður sligið fast í áheitanini á løgting og landsstýri.

## Útseta upplatingina

Leirvíkar bygdarráð sigur víðari í einmæltu áheitanini á myndugleikarnar:

– Hendir tað, at málið verður útsett, heita vit staðiliga á avvarðandi myndugleikar um, at dagurin, tá ið Norðoyatunnilin letur upp fyri almennari ferðslu, verður útsettur í minsta lagi í samsvar við útsetingina av tíðarfreistini í lógini.

Allir sjey limirnir, sum sita í bygdarráðnum í Leirvík, hava skrivað undir einmæltu áheitanina á løgting og landsstýri.




*Leirvíkar bygdarráð mælir einmælt til vegaføring og lokrennu niðri í bygdini*

Mynd: Teknistovan í Gøtu

# Skálaberg afturkomin

**– Fiskiskapurin hendan túrin hevur verið brúkiligur, sigur reiðarin, Hanus Hansen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Teir komu á Klaksvík mikukvøldið og fara væntandi avstað aftur longu mánadagin*

Flakatrolarin, Skálaberg, er komin aftur av túri.

Teir hava roynt í Barentshavinum, har teir hava verið bæði í russiskum og norskum sjógvi.

Skálaberg fór av Klaksvík, 1. desember, og nú teir eru aftur, hava teir umleið 650 tons inni.

## Brúkiligur túrur

Í samrøðu við Norðlýsið, sigur reiðarin, Hanus Hansen, at hesin túrurin hevur verið brúkiligur.

– Veiðan verður løgd upp í Klaksvík, og ætlandi fer Skálaberg nýggjan túr aftur longu mánadagin, sigur reiðarin.

Sosialurin royndi at fáa orð á Hanus Hansen fyrrapartin mikudagin og í morgun, men tað eydnaðist ikki.